## Capello rósar Messi

Venjarin hjá Real Madrid fekk ikki gjørt stórvegis annað enn at rósa Barcelona-spælaranum Lionel Messi eftir stórdystin millum feløgini leygarkvøldið. Dysturin endaði 3-3, og Messi skoraði øll málini hjá Barcelona.
- Messi er eitt óvanligt talent, og hann kann broyta gongdina í einum dysti, nær tað skal verða, segði Capello eftir dystin.
Barcelona var aftanfyri 3-2 og spældi við 10 monnum, tá ið Messi bjargaði liðnum ein javnleik við sínum triðja máli í dystinum.

## Atli aftur á miðvøllinum

Atli Danielsen spældi á miðvøllinum, tá ið Frem um vikuskiftið spældi venjingardyst í Landskrona. Seinastu dystirnar hevur Atli spælt í miðverjuni hjá Frem, men nú slapp hann aftur at royna seg á miðvøllinum, har hann spældi allan dystin. Sambært heimasíðuni hjá Frem spældi liðið væl í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki gekk verri, og danska liðið tapti dystin 2-0.



Neistin-VÍF 36-28 (17-16)

# Neistin koppaði enn einaferð oddaliðnum

**VÍF førdi at kalla allan fyrra hálvleik, men í seinna hálvleiki var eingin ivi um úrslitið. Neistin vann nevniliga ein tryggan sigur, og við sigrinum hava teir skapt rættan spenning í oddinum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Neistin hevði enn einaferð takið á VÍF, tá hesir vitjaðu í Havn. Eftir ein javnan fyrra hálvleiki setti Neistin rættiliga oddaliðið uppá pláss í seinna hálvleiki, og at enda vunnu teir ein tryggan átta mála sigur.*

VÍF hevði møguleika at spæla seg í FM-finaluna við einum sigri á Neistanum, tá ið Neistin tók ímóti teimum í høllini á Hálsi í Atlantic Airways kappingin. Spælararnir hjá Neistanum høvdu ikki nógv annað at spæla fyri enn æruni, men hetta vísti seg at vera meir enn nokk hjá bláa havnarliðnum.

### Nógvir tekniskir feilir

Fitt av fólki var komið saman í høllini á Hálsi at fylgja dystinum ímillum Neistan og VÍF í bestu mansdeildini í hondbólti, men fyrri hálvleikur bleiv ikki nøkur stór hondbóltsuppliving. Liðini gjørdu sera nógvar tekniskar feilir, og hetta kom eisini at seta sín dám á henda hálvleikin.

Tað vóru tó gestirnir úr Vestmanna, sum dugdu betur at revsa feilirnar hjá Neistanum fyrstu løtuna, og dysturin var ikki nógvar minuttir gamal, áðrenn oddaliðið, VÍF, hevði lagt seg á odda við trimum málum. Teir vístu seg at vera heldur betra liðið hesa løtuna, og leiðslan var sum so í lagi, tí Neistin gjørdi sera nógvar feilir fyrstu minuttirnar av dystinum.

So við og við fótaði Neistin sær tó. Spælið hjá heimaliðnum bleiv nú væl betri, og í fleiri førum vóru teir tætt við at vinna leiðsluna hjá vestmenningum innaftur. Men hvørja ferð Neistin nærkaðist, so svaraði VÍF aftur, og tað tóktist vera sera trupult hjá Neistanum at taka síðsta fetið upp til javnleikin.

Móti endanum av hálvleikinum gav stríðið hjá Neistanum tó úrslit. Eftir at vera aftanfyri við tveimum málum, tá góðir tveir minuttir vóru eftir, megnaði Neistin at skora trý mál síðstu minuttirnar, so tá liðini fóru til hálvleiks, var tað brádliga heimaliðið, sum var á odda við einum máli.

### Neistin setti VÍF uppá pláss

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki gekk aftur javnt á millum liðini. Spælið var nú blivið heldur betri enn í seinna hálvleiki, og serliga leikferðin var vorðin hægri. VÍF tóktist vera komin væl út frá seinna hálvleiki, og serliga mótálopini vístu seg at rigga heilt væl. Her fekk Harald Bjørgvin tvey góð mál fyrstu løtuna, og Neistin tóktist hava ávísar trupulleikar við at steðga skjótu mótálopunum hjá VÍF.

Brádliga steðgaði tó alt upp hjá vestmenningum. Neistin fekk rættiliga gongd á verjuna, sum megnaði at steðga skjóttunum hjá VÍF, og í hinum endanum fekk Neistin mál mest sum hvørja ferð. Hetta gjørdi, at Neistin legði seg á odda við fýra málum um miðjan seinna hálvleik, og nú sá ikki gott út hjá oddaliðnum.

VÍF gav tó ikki skarvin yvir uttan at kempa. Tá góðir 10 minuttir vóru eftir at leika, høvdu teir minka um munin niður í eitt mál, og nú var spenningurin í hæddini í høllini.

Hetta skuldi tó vísa seg at vera dagurin hjá Neistanum. Teir øktu aftur nakað um munin, og so var líðugt hjá VÍF. Síðstu løtuna av dystinum bleiv munurin bara størri og størri, og at enda hevði Neistin vunnið ein tryggan og uppibornan 36-28 sigur.

Sjálvt um VÍF tapti dystin fyri Neistanum, so eru teir allíkavæl klárir til finaluna, tí sum úrslitini lagaðu seg, so er einki lið, sum kann hótta teir og Kyndil í oddinum.

## - Hava gott tak á VÍF

Tróndur Kragesten var ein glaður maður eftir sigur á VÍF leygardagin. Hann staðfesti, at Neistin hevur havt eitt gott taka á VÍF í ár.

- Vit hava havt eitt gott tak á VÍF í ár í heila tikið. Síðsta dyst kiksaði ordiliga hjá okkum, eftir at vit vóru frammanfyri við átta málum, men í dag haldi eg, at vit vóru meira kaldir, kanska tí vit ikki hava tað stóra at spæla fyri. Samanumtikið haldi eg, at VÍF fær ikki sítt spæl at koyra í dag, meðan okkara flýtur rættiliga væl, og so hava vit rættiliga lætt við at fáa mál í dag, segði Tróndur Kragesten eftir dystin.

## - Vit eru ov óneyvir

Eftir dystin fingu vit orðið á Inga Olsen hjá VÍF. Hann var sum ver amann skuffaður yvir tapið fyri Neistanum.

- Vit eru ov óneyvir allan vegin ígjøgnum, bæði í verju og álopið. Vit gera sera nógvar feilir í fyrra hálvleiki, og hetta hendir, júst tá vit hava eina tvey ella trý mála leiðslu. Í staðin fyri at vit fara enn longur fram um, so fáa teir okkum aftur. Í seinna hálvleiki koma teir ov lætt til skot, og verjan saman við málmanninum er ikki nóg góð í dag, staðfesti Ingi eftir dystin.

Ingi og hansara liðfelagar fingu tó eina hjálpandi hond frá bæði Kyndli og H71, so sjálvt um teir ikki vunnu ímóti Neistanum, so eru teir tó klárir til finaluna.

## FAKTA

**Neistin-VÍF 36-28 (17-16)**
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Áki Mørk 8 (1), Dan Thorleifsson 6, Jugoslav Djumic 6, Tróndur Kragesten 5, Blagoje Buha 3, Carl Herup Olsen 3, Roar Dalsgarð 2, Birgir Poulsen 1, Jákup Apol 1, Jens Mohr 1
**VÍF:** Sámal Joensen 8 (1), Agnar Joensen 6 (2), Harald Bjørgvin 4, John Zachariassen 4, Áki G. Olsen 3, Ingi Olsen 2, Áki Olsen 1
**Brotskøst:** Neistin 1, VÍF 5
**Útvísingar:** Neistin 3, VÍF 0
**Dómarar:** Sámal Paulason, Kári Hansen